# Neyvan røktarheim á hesum sinni

**Klaksvík:** Nakað av orðaskifti hevur verið til spurningin um eitt nýtt røktarheim skuldi byggjast í Klaksvík, nú ella seinni. Og á býráðsfundi í kvøld verður hetta málið eisini á skránni.

Borgarstjórin, Steinbjørn O. Jacobsen hevur áður sagt, at hetta eigur at bíða, tí tørvur er á øðrum størri útbyggingum í kommununi fyrst. Men úr andstøðuni var ikki semja um hetta, tí hetta málið átti at raðfestast høgt.

Í býráðnum hevur kortini verið arbeitt við hesum málinum, m.a. við at kanna treytirnar fyri at fáa stuðul til bygging av einum ellis- og røktarheimi í býnum.

Sosiala nevndin hevur havt hetta málið til umrøðu, og her mælir ein meiriluti frá, at søkja um stuðul til hesa bygging. Grundgevingin var, at aðrar bráðneyðugar íløgur áttu at verðið gjørdar fyrst, í ár og komandi ár.

Hesi sami meirilutin – Jórun Høgnesen, Gunvá við Keldu og Atli S. Justinussen – heldur tó fast við, at eldraøkið verður tikið við í eini langtíðarfíggjarætlan.

Ein minniluti – Eyðgunn Samuelsen og Hans Arne Bertholdsen – mælir Býráðnum til at senda Almanna- og Heilsumálaráðnum umsókn um stuðul til 32 røktarheimspláss. Umsitingin í býrðanum verður haraftrat biðin um at finna trý tey best egnaðu økini til hetta. Hesi uppskotini skulu so leggjast fyri býráðsfundin í kvøld til støðutakan.

**sb.**




*Røktarheim er knýtt at Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Men tørvurin á slíkum heimi er stórur, og tí verður kannað um og nær eitt nýtt røktarheim kann byggjast í framtíðini*

## Kambsdalur betur egnaður enn Skálabotnur

**Fótbóltshøll:** Á býráðsfundi í Klaksvík í kvøld er eitt av málunum á skránni, tann ætlaða innandura fóltbóltshøllin í Skálabotni.

Fyrireikararnir av hesi høllini hava arbeitt við hesum málinum í eina tíð, og fleiri kommunur hava eisini havt hetta til viðgerðar. Teirra millum er Klaksvíkar kommuna, har byggi- og býarskipanarnevndin er positivt sinnað fyri ætlanini.

Tá tað er sagt, so metir nevndin kortini, at staðsetingin í Skálabotni er ov langt burtur frá Klaksvík. Mælt verður tí ístaðin til at kanna, um ikki er møguligt at byggja eina slíka høll á Kambsdali ístaðin.

Hesum uppskoti taka eisini tekniska nevndin, mentanarnevndin og fíggjarnevndin í Klaksvíkar býráði undir við.

Og í kvøld skal so býráðið sjálvt taka støðu til hetta málið.

**sb.**

# Grønland í SMS

**Í morgin, fríggjadagin og leygardagin verður forvitnislig framsýning um Grønland á Torginum í SMS**

TÍÐINDASKRIV

Grønland hevur við síni mentan, landslagi og djóralívi nógv spennandi at bjóða, og á Torginum verður høvi at síggja eina rúgvu av grønlendskum myndum, klæðum, handverki og list. Talan er um lutir og list úr hvalatonn, feittsteini, perlum, kópaskinni o.s.fr. Eisini fara børn at sita og seyma ymiskt úr skinni og grønlendskum perlum.

Framsýningin um Grønland er sett upp í sambandi við inntøkufremjandi tiltak hjá skúlaflokki í Hoyvíkar skúla. Børnini skulu til Grønlands á námsferð næsta ár og eru nú farin undir fyrireikingarnar. Tey fara at vitja oynna Uummannaq har norðuri í Grønlandi. Á oynni búgva uml. 1200 fólk og næmingarnir verða hýstir hjá privatfólki. Lagt er upp til eina spennandi, lærurika og ógloymandi námsferð og tað ber framsýningin á Torginum brá av.

ÚTSØLA -50%

FRÍGGJAMORGUNIN 27.JANUAR kl. 10.00

LEYGARDAGIN OPIÐ TIL KL. 16.00

CHEAP
tel 457 921

LUNELL
tel 457 821

MASKULIN
tel 456 200

KLAKSVÍK